Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sámal Hanni Lognberg, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Grótkastið á Símunarbukt í Skopun

Spurningar:

1. Hví er Landsverk ikki farið undir at umvæla grótkastið á Símunarbukt í Skopun?
2. Nær verður farið undir hetta arbeiðið?

Viðmerkingar:

Stór skør eru í grótkastinum á Símunarbukt, og hetta kemst av tí stóra uppganginum, sum var.

Landið eigur grótkastið og spurningurin er, um landsstýrismaðurin ætlar sær at handa Skopunar kommunu grótkastið í tí standi, tað er í dag.

Landsverk eigur stórt grót á goymslu á keiøkinum í Skopun, og tí kundi verið upplagt at fingið umvælt grótkastið, áðrenn veturin aftur kemur á okkum og vit kanska standa í einari enn verri støðu, sum t.d. at enn meira av gróti má fáast burtur av grótverjuni. Hetta vildi havt við sær meira umfatandi umvæling og hægri kostnað fyri landið. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 1. apríl 2022

Sámal Hanni Longnerg